# Hanus og Aldubáran – vemm

**Hanus og Aldubáran spældu eina frálíka konsert á Norður Bryggjuni, har framførslan av lagnum Timburmenn var so sannførandi, at upplivingin varð vemmilig og lekkur í senn**

*Orð: Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun Jóannesarson*



*Fleiri ungir blásarar eru við Aldubáruni.*

Tað var fullsett á Norður Bryggjuni, tá Hanus, Karl Martin og Anna Maria saman við Aldubáruni spældu konsert fríggjakvøldið. Hetta var seinasta konsert á konsertferðini hjá teimum. So nógvur gravgangur var eftir atgongumerkjum, at útselt var, og fólk stóu á bíðilista fyri at sleppa inn.

## Tað besta innan føroyskan tónleik

Aldubáran umboðar kremið innan føroyskan tónleik, og tað er ringt at seta fingur á naka í teirra framførslu. Hon var frálík. Eisini var tað gleðiligt at síggja øll tey



*Gandakenda violin skapti vakrar myndir og bergtók lurtaran*

ungu andlitini á pallinum, og at hesi fingu so gott pláss í ljóðmyndini.

Eisini frásøgumaðurin var herligur, við síni gøtudonsku dialekt og frálíku frásøgnum um yrkjarar og listarfólk annars. Tó var eingin ivi um, hvør var stjørnan á kvøldinum. Tá Hanus kom á pallin varð klappað, bríkslað og rópt.

Konsertin var býtt upp í tveir partar, seinna part við Hanusi og fyrra part við løgum, ið Páll Sólstein hevði skrivað til yrkingar eftir Christian Matras, William Heinesen, Hans Andrias Djurhuus og Steintór Rasmussen. Í hesum parti av konsertini sungu Anna Maria Olsen og Karl Martin Samuelsen. Hetta vóru fitt løg til fittar yrkingar, fyri tað mesta sungin sera fitt, tó tyktust bæði Karl Martin og Anna Maria rættuliga merkt av nervum fyrsta part av framførsluni.

## Ikki so spennandi

Tey fyrstu løgini, ið vóru bygd á yrkingar eftir Christian Matras, vóru ikki serliga spennandi. Tey vóru pen og klassisk, men høvdu eina undirliggjandi kenslu av onkrum eitt sindur meira dramatiskum, tó megnaðu sangrøddirnar ongantíð at røkka hetta.

Karl Martin er kendur av rokkpallinum, og røddin manglar ikki góðsku, men hóskaði illa til hendan stílin, í øllum førum fríggjakvøldið. Fyrsta lagið ljóðaði av klumpi í hálsinum hjá Karl Martini.

Anna Maria hevði sungið eina løtu, áðrenn man fyrstu ferð hoyrdi hana. Um hetta var orsakað av ringari mikronstýring, ella um ljóðmaðurin átti feilin, veit eg ikki. Men hesin trupulleiki var afturvendandi í framførsluni hjá Karl Martini og Annu Mariu, fleiri ferðir hoyrdust tey als ikki, og tá tey sungu kór hjá hvør øðrum, bar næstan ikki til at hoyra tey.. Annars ljóðaði Aldubáran sum heild væl, eg sat tó ov aftarlaga til at síggja, um okkurt ljóðføri varð gloymt av og á. Tað er jú nógv týðiligari, tá man gloymir ein sangara.

## Meðan vit bíða eftir Hanusi

Longu í næsta lagi var Karl Martin eitt sindur betur við, tó uttan at fullkomiliga sannføra. Fyri áskoðararnar, ið bíðaðu eftir Hanusi, var hetta sum ein skál av rís, meðan man bíðar eftir Lambslundum í trøffelsós. Heilt galið gjørdist tað í



*Við gittara í hond og Aldubáruni í rygginum, spældi Hanus eina sannførandi konsert*